Fjølmiðlarnir misskilja norsku rúsdrekkahagtølini

Vit fara at royna enn einaferð at greiða frá, hvussu serfrøðingar meta at norska rúsdrekkanýtslan í veruleikanum er sett saman. Tey tøl, ið vit nýta eru sum oftast tøl og kanningar, sum norska »rusmiddeldirektoratet« kemur við. Rusmiddeldirektoratet er tað sama sum »Rúsdrekka og Narkotikaráðið« í Føroyum og hevur einki við norsku frálhaldsrørsluna at gera. Orsøkin til okkara skriving um norsk hagtøl og kanningar skal heldur ikki skiljast sum nakað forsvar av hækkingunum av brennivínsprísunum í Føroyum. Vit vilja bara gera Føroya fólki vart við, at ymiskir fjølmiðlar og lesarar hava fingið ta »misfatan«, at meira enn helvtin av øllum »rúsdrekka«, ið norðmenn drekka, er heimabrent. Slíkar misskiljingar gera at kjakið um okkara nýggju rúsdrekkalóg verður myndað av veruleikafjarum mytum, heldur enn objektivum kanningum og faktavitan um rúsdrekkanýtslu.

svarar til uml. ein kassa av øli.

Ein norskur tíðindastubbi í Útvarpi Føroya

Herfyri hevði tíðindasendingin hjá Útvarpi Føroya ein tíðindastubba frá NTB um smugling og heimabrenning í Noregi. Um hesin tíðindastubbi var eitt svar upp á eina viðmerking, ið vit høvdu til Fimmaran 6. januar, vita vit ikki, men lat tað fara. Vit hava frá ÚF fingið sent omanfyrinevnda telefax, ið ÚF hevði móttikið frá »Norsk Telegram Bureau«.

Í telefaxinum skrivar Egil Damstuen um »Norsk Alkohol-politik i krise«. Hesin skrivar m.a. citat **»Leiðslan á vinmonopolinum metir at teirra handlar einans stóðu fyri uml. 40 prosentum av allari brennivínssølu og umsetningi av brennivíni í landinum«,** viðari sigur Egil Damstuen **»Um tann restriktivi alkoholpolitikkurin hjá Noregi, har víneinkarsølan hevur einarætt at selja vín og brennivín, hevði virkað í prakis, so vildu tær statsligu einkarsølurnar staðið fyri uml. 100 prosentum av tí samlaða umsetninginum«.** Egil sigur at orsøkin til minkingina í søluni av brennivíni eru teir høgu prísirnir, sum hava ført við sær størri smugling og heimabrenning.

Sølan av **BRENNIVÍNI** er tíðarskeiðinum 1987 til 92 minkað við 40 prosentum. Hetta verður so tikið sum eitt tekin um at smuglingin er vaksin. Hann nevnir tó at sølan av teimum veikaru sløgunum er eisini økt í sama tíðarskeiði, og at tann samlaða nýtslan hjá norðmonnum møguliga er minkað.

Alt tað sum Egil Damstuen skrivar í hesum tíðindastubba til ÚF eru subjektivar metingar. Hann brúkar allatíðina orð sum t.d. **kanska, man metir, tað er ongin grund til at trúgva o.s.fr.** Tað stendur so upp til okkum at velja hvørjum vit vilja trúgva. Nú er tað soleiðis at vit ikki búgva í Noregi, og tí hava vit litla føling við hvat ið hendir á rúsdrekkaøkinum hjá teimum.

Hvat siga norsku serfrøðingarnir?

Vit ringdu hósdagin 14.01. til »Statens institut for alkohol- og Narkotika forskning« og fingu fatur á Sturla Nordlund, sum er ein tann fremsti akoholforskarin í Noregi, og sum hevur skrivað hópin av bókum um rúsdrekka- og narkotikanýtslu í Noregi (hann hevur einki við norsku frálhaldsrørsluna at gera).

Nordlund fortaldi okkum m.a. **at tað er rætt at Vinmonopolið metir at tey einans standa fyri uml. 40 prosentum av tí samlaða umsetninginum av brennivíni í Noregi, men at hini 60 prosentini ikki bara er smuglaraspritt og heimabrent brennivín. Hann segði at uml. 10 til 15% verður innflutt við ferðafólki, tvs. at uml. 45% av tí samlaðu brennivíns nýtsluni verður smugl..að ella brent ólóg-liga. Nú mugu mugu vit minnast til at norðmenn drekka ikki bara brennivín og at bæði vín og øl er lógligt at bryggja í Noregi. Norlund segði at uml. 30% av tí ið norðmenn dreka, er brennivín, restin er øl og vín. Um vit nú siga at helvtin av brennivíns-**

Oversigt over nordmenns totalkonsum av alkohol innan og utenfor landet, målt i liter ren alkohol, 1989.

	1 000 liter	Liter pr. innbygger 15 år og over	%
Hjemmeproduksjon			
Brennevin	1 680	0,49	6,2
Vin	1 400	0,41	5,2
Øl	140	0,04	0,5
Legal import			
Brennevin	1 708	0,50	6,3
Vin	683	0,19	2,5
Øl	27	0,01	0,1
Smugling:			
Brennevin	977	0,29	3,6
Teknisk sprit:			
Brennevin	253	0,07	0,9
Konsum i utlandet:			
Brennevin	1 025	0,30	3,8
Vin	503	0,15	1,9
Øl	1 223	0,36	4,5
Konsum på reise til utlandet:			
Brennevin	57	0,02	0,2
Vin	17	-	0,1
Øl	52	0,02	0,2
Registrert konsum:			
Brennevin	4 539	1,33	16,8
Vin	3 310	0,97	12,2
Øl	9 504	2,78	35,1
Totalt	27 098	7,93	100,1

Kelda »Alkoholens Kilder« 1991

Orðið »rúsdrekka« verður brúkt tilvildarliga!

Orsøkin til fleiri misskiljingar er m.a., at orðini »rúsdrekka, alkohol og brennivín« verða blandað saman hvørt um annað. Tá ið vit t.d. siga, at »helvtin av øllum rúsdrekka, ið drukkið verður í Noregi, er heimabrent«, er hetta beinleiðis skeivt. Orsøkin til henda skeivleika er at vit blanda orðini rúsdrekka og brennivín saman.

Við rúsdrekka meinast bæði brennivín, vín og øl.

Hvat er alkohol?

Við alkohol ella alkoholprosent meinast nøgdin av reinum alkoholi, sum er í teimum ymsu drykkjunum, t.d. inniheldur vín uml. 12% reint alkohol, meðan brennivín inniheldur uml. 40 til 50% reint alkohol, og ein øl inniheldur í mesta lagi 5,8% reint alkohol, hetta er ein av orsøkunum til at nýtt verða ymsar støddir av gløsum til teir ymsu drykkirnar.

Fyri at finna fram til ta samlaðu nýtsluna av reinum alkoholi (100%) í einum landi, mugu vit sostatt umrokna tey ymsu sløgini til 100% reint alkohol, t.d. svarar ein litur av 50% brennivín til uml. 50 cl. av reinum alkoholi, sum aftur

Teknað hevur Nils Petterson, fyri UNF í Svøríki

